


# Lort í býin á fløgu

- Sum tað er gott endliga at fáa fløguna. Eg havi verið soooo spent, sigur Meyla,nú fløgan við kendu løgunum er komin á fløgu. Meyla sigur, at fløguhúsin eisini er ordiliga kulur - ella eg skuldi kanska heldur sagt gulur, siugr hon. Inni í er ein plakat av mær, S'marna, Jógvan L. og Dia Regini og á baksíðuni á henni eru allir sangtekstirnir - tað haldi eg er nokk so smart. Meyla vónar, at øll fara at taka væl ímóti fløguni, og hon er serliga spent at vita, hvat fjeppararnir fara at halda um nýggju fløguna. Umframt Meylu eru eisini S'marni, Jógvan L., Dia Regin og Knøttur at hoyra á fløguni.




# Gras-etandi filantropur

**Vælgerð og umhvørvisvernd viga nógv hjá Bryan Adams, sum gjøgnum árini hevur verið við til savna inn stórar milliónaupphæddir til síni hjartamál**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Umframt at nýta nógva tíð til tónleikin, so hevur Bryan Adams eisini nýtt hendan pallin til at gera vart við viðurskifti í heiminum, sum hann vildi havt øðrvísi.

Soleiðis var hann partur av stóru Live-Aid konsertini, eins og hann saman við eitt nú Sting, U2 og Peter Gabriel, Paul McCartney og Dire Straits hevur verið partur av konsertferðum fyri Amnesty International.

Av øðrum vælgerandi konsertum, sum hann hevur verið partur av, kunnu nevnast stóra the Wall konsertin í Berlin í 1990 og stóra føðingardagskonsertin fyri Nelson Mandela á Wembley í 1987. Hann varð fyrsti vesturlendingurin, sum hevði konsert í Karachi í Pakistan, har endamálið var at savna pening til skúlagongd hjá fátøkum børnum, og í heyst hevur hann spælt í Tel Aviv og Jericho, har endamálið við sonevndu OneVoice Movement konsertunum er at hjálpa til at loysa ísraelsku-palestinsku konfliktina.

Hartil hevur hann eisini verið við, tá innsavningartiltøk til einstøk endamál hava verið á skránni. Eitt nú eftir Tsunami vanlukkuna. Til hesa savnaði hann ikki minni enn 15 milliónir krónur, tá hann á uppboði seldi ein guitara, sum fleiri av fremstu guitarspælarunum í heiminum høvdu signerað til júst hetta endamálið.

### Gras og grind

Her í Føroyum minnast fólk hann kanska meira fyri hansara aktiva leiklut í umhvørvisstríðnum. Hann hevur verið partur av útgávum, sum hava havt til endamáls at stuðla Greenpeace í teirra stríði. Millum annað móti grindadrápi.

Sjálvur hevur Bryan Adams seinastu 12 árini verið vegetarur burturav, og verður googla eftir Bryan Adams+Pilot Whales, koma hópin av slóðum fram. Bæði síður, har hann framgongur sum stuðul hjá Greenpeace, eins og hann eisini er sonevndur celebrity-stuðul hjá øðrum umhvørvisfelagsskapum.

Ikki minst í stríðnum móti grinda- og springaradrápum í Japan.



*Live-framførslurnar hjá Bryan Adams hava mest sum legendariskan status. Nakað sum hann eisini hevur nýtt til at savna inn pening til vælgerandi endamál av ymsum slag. Millum annað til at mótmæla grindadrápi*

## Diskografi

| | |
|---|---|
| 1977 | Sweeney Todd |
| 1980 | Bryan Adams |
| 1981 | You Want It, You Got It |
| 1983 | Cuts Like A Knife |
| 1984 | Reckless |
| 1987 | Into The Fire |
| 1988 | Live! Live! Live! |
| 1991 | Waking Up The Neighbours |
| 1993 | So Far So Good |
| 1996 | 18 Til Die |
| 1997 | Unplugged |
| 1998 | On A Day Like Today |
| 1999 | The Best Of Me |
| 2002 | Spirit OST |
| 2004 | Room Service |
| 2005 | Anthology |

Hartil hevur Bryan Adams staðið fyri 42 Soundtracks til filmir. Millum annað A Night in Heaven, Pink Cadillac, Renegades, Prince of Thieves, What's Love Got To Do With it, The Three Musketeers, 101 Dalmatians og Hope Floats.

Hevur hartil sungið duettir saman við hópin av øðrum sangarum, eins og hann eisini hevur skrivað løg fyri onnur. Eitt nú kunnu nevnast Tina Turner, Joe Cocker, Billy Ray Cyrus, Ronan Keating, Bonnie Tyler, Celine Dion, Sting, Rod Stewart, Motley Crue, Barbra Streisand og Neil Diamond.

GLØGG & HOLUKØKUR
kr.60,-
hvonn.fo
Opið hvønn dag kl. 12-24
Frí & ley til kl. 02.00


hvonn
BRASSERIE
Tórsgøta 4
100 Tórshavn
Tel 350035
hvonn@hvonn.fo
www.hvonn.fo